

# Lena, Guðrun og Eivør í essinum

**Klokkan 15 leygardagin byrjaði tann fyrsta av trimum konsertum við Lenu, Guðrun og Eivør í Norðurlandahúsinum**

TÓNLEIKUR
*dagfinn@sosialurin.fo*

Havfrýr. Soleiðis nevna Sansir og blaðið Kvinna Lenu, Guðrun og Eivør, tá tey skipa fyri konsertum við teimum. Í Danmark var samansetingin sera væleydnað, og nú hetta verður uppafturtikið í Føroyum, var útselt til tær báðar konsertirnar leygardagin og til konsertina sunnudagin.

Í steðginum í fyrstu konsertini, sum byrjaði klokkan 15 leygardagin, fingu vit orð á fyrireikaran og blaðstjóran á Kvinnu, Lenu L. Mohr, og hon var sera væl nøgd við konsertina.

Eisini visti hon at siga, at tær tríggjar songkvinnurnar vóru í essinum og vóru sera væl nøgdar, tá tær komu afturum pallin í steðginum.

Klokkan 20 leygarkvøldið fóru tær tríggjar aftur á pallin í Norðurlandahúsinum og aftur sunnudagin var ein konsert, og útselt var til konsertirnar. Tað sigur ikki so lítið um áhugan fyri konsertunum og um dygdina framførslunum.

# Tingið aftur úr jólafrí

**Ein fyrsta viðgerð og svar upp á tveir fyrispurningar eru á skránni á fyrsta tingfundinum í hesum árinum**

LØGTINGIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Jólafrítíðin hjá Løgtinginum er liðug. Fyrsti løgtingsfundurin eftir nýggjár verður seinnapartin í morgin. Tingformaðurin hevur stevnt tinginum til fundar klokkan 13.30 í morgin – týsdagin 31. januar.

Á skránni eru fýra mál. Tað fyrsta er fyrsta viðgerð av uppskoti til løgtingslóg um tinglýsingaravgjald. Eftir viðgerðina verður málið beint í fíggjarnevndina.

Annað málið er, at Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, skal svara fyrispurningi frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um fíggjarpolitikk og realløn hjá ymsum samfelagsbólkum.

Triðja málið á skránni er, at Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum skal svara fyrispurningi frá Heidi Petersen, løgtingsmanni, um manning við skipum. Framløga er eisini á skránni.

Sambært vegleiðandi skránni fyri tingarbeiðið, sum sæst á heimasíðuni hjá Løgtinginum, so er ætlanin eisini at hava tingfund mikudagin 1. februar. Tá verða munnligir fyrispurningar svaraðir.

Mánadagin 6. og týsdagin 7. februar verður ungdómsting. Mikudagin 8. februar er ætlanin at hava ófráboðaðar fyrispurningar á skránni og eisini 1. viðgerðir. Harafturat fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, at leggja fram frágreiðing um vinnupolitikk. Henda frágreiðingin verður tikin til orðaskiftis týsdagin 14. februar, og mikudagin 15. februar verða aftur munnligir fyrispurningar á skránni.

Løgtingið hevur hildið frí síðani 20. desember, tá ið ikki færri enn tríggir fundir vóru. Umframt onnur mál so viðgjørdi tingið henda dagin á trimum fundum eykafíggjarlóg, sum varð samtykt eftir at tað varð samtykt at víkja frá teimum í tingskipanini ásettu tíðarfreistunum.

Eftir at løgmaður hevði hildið nýggjársrøðuna, heitti Tjóðveldisflokkurin á tingformannin um at kalla tingið saman at viðgera nýggju støðuna, sum teir mettu vera íkomna, eftir at løgmaður hevði boðað frá fráboðanini, sum danska stjórnin hevði sent til ST. Tingformaðurin svaraði, at hann ikki helt, at talan var um nakað mál, sum var so akutt, at tað var neyðugt at kalla tingið saman.

Frá Ólavsøku og til jólar vóru 50 tingfundir.



KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 5 2006

# Vøksturin í USA minni enn væntað

Marknaðarrák

Fríggjadagin í farnu viku varð vøksturin í amerikanska bruttotjóðarúrtøkuni fyri 4. ársfjórðing kunngjørdur, og hann var nógv minni enn væntað. Bert 1,1% ímóti væntaðu 2,8%. Sostatt vaks amerikanski búskapurin tilsamans 3,1% í fjør. Hóast sjálvt BTÚ-talið var eitt vónbrot, tóku marknaðirnir ikki so illa ímóti tí. Partabrøv hækkaðu, og renturnar vóru á leið óbroyttar. Mett verður, at hækkandi oljuprísurin í heyst hevur verið við til at fáa vøksturin í BTÚ at minka, millum annað við at toga samlaða virði av innflutningi upp. 3,1% er ein heilt hampuligur vøkstur, og haraftrat vórðu vøksturin í bæði privatari nýtslu og prísvøkstri væl størri enn væntað. Hetta hevur nógv at týða, tí privat nýtsla er 2/3 av amerikanska búskapinum.

## Renturnar hækka

Hóast BTÚ úr USA var nógv verri enn væntað, hildu lánsbrævarenturnar áfram at hækka í farnu viku. 10-ára danska rentan hækkaði 0,11% til 3,46%. Innloysingar í úrtíð til apríl-terminina síggja ikki út til at gerast stórar, so stutt realkredittlánsbrøv geva væntandi góðan vinning.

## Roknskapur frá Novo Nordisk

Úrslitið hjá Novo Nordisk fyri 4. ársfjórðing í fjør var 18% lægri enn árið fyri. Orsøkin var serliga, at Novo ikki endurtók eina gjaldoyraverju, sum áður hevur stuðlað inntøkunum. Novo Nordisk er tó bjartskygt um komandi árið, og væntar, at úrslitið fer at hækka meira enn 10% og at sølan í minsta lagi fer at hækka 10%. Hóast úrslitið fyri 4. ársfjórðing var vánaligt, er Novo Nordisk framvegis eitt gott og væl rikið felag, ið lítil váði er tengdur at. Kursurin á Novo Nordisk liggur í løtuni á 344, men Kaupthing metir, at kursurin eigur at liggja einar 10 krónur hægri.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður sera hendingarík. Tað koma ein rúgva av týdnigarmiklum lyklatølum og fleiri áhugaverdir roknskapir, m.a. frá Ericsson. Hesin kann ávirka partabrævamarknaðirnar. Viðv. lyklatølunum, verður dentur serliga lagdur á prísvakstrartøl báðu megin Atlantshavið, umframt amerikonsku arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina, sum kemur fríggjadagin. Um hon verður góð, stuðlar hetta eisini undir partabrøvum á okkara leiðum.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 617,09 | 0,4% |
| JPY | 5,26 | -1,4% |
| GBP | 1.091,11 | 0,2% |
| NOK | 92,35 | -0,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 102,60 | -0,6% |
| Evru Lánsbrøv | 172,01 | -0,7% |
| Norrøn Partabrøv | 110,69 | 0,7% |
| Altjóða Vøkstur | 73,00 | -1,4% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*